# »Eg vil so fegin hava, at børnini læra føroyskt«

Hósdagin kl. 8:30 fer Suni Poulsen, organisatiónspsykologur, at leggja fram triðja og seinasta part av kanningini, sum er gjørd millum føroyskar útisetar í Danmark. Tórshavnar kommuna hevur verið við til at skipað fyri kanningunum, ið varpa ljós á føroyskar útisetar í Danmark og útlitini fyri at teir koma heim aftur. Triðji og seinasti partur av kanningin er givin út í riti, ið hevur fingið heitið ”Eg vil so fegin hava, at børnini læra føroyskt”. Við hesum riti er stóra kanningin, sum Norðuratlantsbólkurin fór undir fyri fýra árum síðani, komin at enda. Fyrsti partur, ið bygdi á tøl frá Danmarks Statistik, var eitt fullfíggjað yvirlit yvir, hvussu nógvir føroyingar búgva í Danmark, hvussu gamlir teir eru og hvat teir gera. Annar partur, sum bygdi á spurnarbløð og varð lagdur fram í september 2008, lýsti orsøkirnar til, at føroyingar fara til Danmarkar, hví so nógvir verða verandi, og hvat tað er, sum tey sakna í Føroyum. Í triðja og seinasta parti eru fólk í seks fokusbólkum biðin um at siga sína hugsan og seta orð á sínar kenslur um hesi somu viðurskifti. Á henda hátt gerast tølini í hinum pørtunum viðkomandi og livandi. Suni Poulsen, sum hevur staðið fyri hesum arbeiðinum, er organisatiónspsykologur og medeigari í donsku fyritøkuni MarketMinds. Framløgan verður í Ráðhúsinum hjá Tórshavnar kommunu á Vaglinum í Havn.





*- Ein sjúkramelding er ofta eitt tekin um eina ógvusliga støðu á arbeiðsplássinum, sigur Henrik Holt Larsen, professari við Institut for Organisation, Copenhagen Business School, CBS.*

longur. Fyrr aktaði borgarin til dømis politiið. Í dag verða politistar í heilum drignir í rættin ella útsettir fyri harðskap, tá teir koma í samband við borgaran. Og tað er ikki av ongum, at sosialrágevin situr næst hurðini, so til ber at leypa út, um brúkarin skuldi gjørt seg inn á hann ella hana. Eisini mugu starvsfólk hjá kommununum liva í ótta fyri harðskapi og hóttanum, greiðir Henrik Holt Larsen frá.

- Innan tað almenna eru nógv fleiri kropsligar hóttanir enn hjá tí privata. Hetta ávirkar sjálvandi sjúkrafráveruna. Ein sjúkramelding er ofta eitt tekin um eina ógvusliga støðu á arbeiðsplássinum. Tá er umráðandi, at fólk ikki ganga einsamøll við trupulleikanum, tí tað kann gera støðuna uppaftur verri, sigur Henrik Holt Larsen. Hann leggur afturat, at tað veldst altíð um einstaka málið, hvussu arbeiðsgevarin skal reagera í sambandi við eina sjúkramelding.

- Til dømis skal bankafólkið, sum hevur verið fyri einum ráni, ikki sendast heim við einari sjúkramelding. Harafturímóti skal leiðslan viðgera ítøkiligu støðuna og finna uppgávur til starvsfólkið, til tað er kemur upp undan aftur, sigur Henrik Holt Larsen.

Hann heldur ikki, at leiðslurnar skulu spara upp á heilsufremjandi tiltøk á arbeiðsplássinum.

- Serliga nú kreppa er í luftini, hava vit tørv á at kanna og røkja framleiðslutólini, eisini tey menniskjaligu. Tað vil siga kropsligu og sálarligu støðuna hjá fólki, so vit klára okkum sum best undir kreppuni, sigur hann.